Vágatunnilin p/f

# Vágatunnilin

# Tilmæli til aðalfundin 24/6-99




Juni 1999

# Vágatunnilin p/f

## 0. Inngangur

Landið hevur stovnað Vágatunnilin p/f við tí endamálið at byggja fast samband um Vestmannasund og felagið fer at krevja nýtslugjald til at fíggja íløguna. Til at fáa til vega fast samband um Vestmannasund hevur Løgtingið í fíggjarlógini 1999 sett av 20 mió kr, eins og 20,3 mió kr vóru tøkar árið fyri. Landsstýrið kemur fylgjandi 7 ár at seta 20 mió kr í felagið. Samlaði partapeningurin í felagnum verður tá 160,3 mió kr.

Í viðtøkunum fyri felagið er ásett, at partafelagið skal, sum heild verða rikið eftir meginreglunum fyri vinnuligar fyritøkur og vera óheft av politisku skipanini. Einasti partaeigari er Landsstýrið umboðað av Vinnumálastýrinum, ið velur nevnd við upp til 5 limum.

Síðani stovnanina hevur nevndin kannað hvussu arbeiðið at byggja fast samband um Vestmannasund kann fremjast, hvussu fígging kann fáast til vega, og hvørjar fortreytirnar eru fyri hesum. Í hesum sambandi hevur nevndin vitjað Hvalfjørðurtunnilin í Íslandi har eisini kunnandi fundir vóru við tunnilsfelagið, vegamyndugleikarnar og samferðslumyndugleikarnar. Nevndin hevur sett seg inn í kanningar og fyrireikandi arbeiði, ið Landsverkfrøðingurin hevur gjørt og byggir tilmæli sítt á hetta, eins og hon hevur leitað sær serkøna hjálp viðvíkjandi løgfrøði, jarðfrøði og jarðtøkni eins og tekniska ráðgeving.

Nú frágreiðing verður latin eigaranum, er fylgjandi greitt:

- nevndin mælir til at undirsjóvartunnil verður bygdur eftir linjuni har sett var á í 1989
- jarðfrøðisliga grundarlagið eins og tekniska projektið verður dagført við atliti til nýggjastu royndirnar innan undirsjóvartunnilsgerð í Íslandi og Noregi
- tunnilsarbeiðið verður boðið út í Norðurlondum við teirri treyt at samstarv er við føroyskar arbeiðstakarar meðan onnur arbeiði verða boðin út millum føroyskar arbeiðstakarar ella har førleiki er
- arbeiðið kann byrjast fyrst í komandi ári, og kann fremjast innan 3-4 ár
- tilsøgn um byggifígging og endaliga fígging er fingin til vega
- ein anleggslóg má samtykkjast, ið staðfestir játtan, útvegar neyðugar heimildir v.m. og sum gevur grundarlag fyri at geva lánveitaranum neyðugu trygdina.




Arbeiðsætlanin fram til arbeiðið byrjar er víst á hjástandandi mynd. Á myndini sæst, at politiska viðgerðin og positiva støðutakanin til uppskotið um anleggslóg er ein grundleggjandi fyritreyt fyri at arbeiðið kann fremjast sum ætlað. Fram til lógin er samtykt, kunnu fyrireikingar gerast viðvíkjandi projekti, neyvari kanningum av ymsum slag og útbjóðing og sáttmálasamráðingar, men undirskriving av sáttmála fyri at fremja arbeiðið og arbeiðsbyrjan eru ikki møgulig fyrr enn omanfyrinevndu treytir eru loknar. Somuleiðis er anleggslógin ein fyritreyt fyri tilsøgnina um fígging.

## 1. Projektið

Vágatunnilin er heitið á tunnlinum undir Vestmannasund millum Leynar og Kálvadal sunnan fyri Fútaklett. Arbeiðið, sum gerast skal, fevnir um 0,3 km av vegi Streymoyarmegin, 4,7 km av tunnli og 1,9 km av vegi Vágamegin. Á hjáløgdu tekningum er víst planur av tunnlinum, tvørskurður og longdarskurður. Linjuføringin av vegum og tunnli er á einum støði, sum samsvarar við landsvegirnar í landinum annars. Tvørskurðurin á tunnlinum eins og ljós og útgerð annars kemur at vera nakað sum tað sæst í Kollfjarðartunnlinum dagin í dag.

Í talvuni niðanfyri er yvirlit við ymsum tølum viðvíkjandi tunnlinum

| | | Alt III |
|---|---|---|
| Breidd x hædd | | 10 x 4,6 m |
| | | |
| Longd á tunnli | | 4,7 km |
| Longd á vegi Streymoyarmegin | | 0,3 km |
| Longd á vegi Vágamegin | | 1,8 km |
| Longd tilsamans | | 6,8 km |
| | | |
| Minsti bogi síðuvegis í tunnlinum | radius = | 800 m |
| Minsti bogi longdarvegis í tunnlinum | radius = | 7500 m |
| Partur av tunnlinum har hallið er 70 ‰ ella minni | | 3575 m |
| Partur av tunnlinum har hallið er meira enn 70 ‰ | | 1050 m |
| | | |
| Koyrilongd úr Leynartunnlinum til Oyrargjáarvegin | | 7,6 km |
| | | |
| Mettur kostnaður av tunnli | | 200 mió kr |
| Mettur kostnaður av vegum | | 40 mió kr |
| Mettur kostnaður tilsamans | | 240 mió kr |

Nevndin hevur valt at fara undir tunnilin á sama stað og við somu linjuføring, sum ætlanin var í 1989. Hendan linjan er vald við atliti til at hon er mjúkari og slættari enn norðara linjan, sum eisini hevur verið uppá tal, og kemur ferðslan at ganga betri eftir hesari. Eisini slepst undan at ferðslan frá tunnlinum fer eftir tronga og krókuta vegnum við Leynar og Stykkið. Somuleiðis slepst undan at leggja atkomuvegin gjøgnum síðubratta lendi norðan fyri Kvívík, har nógvur kavi legst.

Metingarnar hjá nevndini byggja í stóran mun á tað fyrireikandi arbeiðið, sum var gjørt fram til 1989. Tó er jarðfrøðisliga grundarlagið endurskoðað og dagført, eins og tekniski parturin av projektinum verður endurskoðaður og dagførdur við atliti til nýggjastu royndirnar innan undirsjóvartunnilsgerð í Íslandi og Noregi, og í samsvar við galdandi norskan tunnilnormal.

**1.1 Val av linju**
**- Kannaðir møguleikar**

Kanningarnar, ið Landsverkfrøðingurin gjørdi av tunnilslinju fyri undirsjóvartunnilin millum Streymoynna og Vágoynna, áðrenn farið varð undir at rigga til í 1989, førdu til at tveir høvuðsmøguleikar vórðu staðfestir, ein norðari (alt II), frá nakað sunnan fyri Sunnarugjógv til leiðina við Fútaklett, hin sunnari frá Leynum til leiðina við Kálvadal (alt III). Ein linja frá økinum millum Norðara Gjógv og Sunnaru Gjógv á Streymoynni til leiðina beint norðan fyri Fútaklett, sum í fyrstu atløgu tyktist at vera tann styttsta og bíligasta, varð slept alt fyri eitt av jarðfrøðisligum ávum.

Norðari møguleikin (alt II) førir til ein styttri tunnil, men nakað longri atkomuvegir. Serliga atkomuvegurin Streymoyarmegin verður longri, og kemur at fara oman gjøgnum líðina norðan fyri Kvívík, har síðubratt verður, og har nógvur kavi legst.

Sunnari møguleikin (alt III) førir til ein nakað longri tunnil, men hevur styttri atkomuvegir. Við tað at tunnilin í hesum førinum fer inn frá landsvegnum nakað oman fyri Leynar, verður ferðslan til Vágarnar beind burtur av vegnum á Stykkinum, ið er trongur og krókutur og har tað er sera trupult at bøta um vegin.

Alt II hevur ein nakað styttri tunnil og heldur meira av vegagerð enn Alt III. Linjuføringini hjá Alt II er nakað krappari, bæði síðuvegis og longdarvegis, eins og tunnilin sjálvur verður nakað brattari, enn Alt III. Longdin frá Leynartunnlinum til Oyrargjáarvegin vildi fyri Alt II verið 10,6 km meðan sama longd fyri Alt III verður 7,6 km. Kostnaðurin á Alt II varð í 1987 mettur at vera uml. 20% minni ann á Alt III, tá var ikki kostnaðurin av ábótum á vegnum við Stykkið tikin uppí.

Báðar linjurnar vórðu kannaðar nakað gjøllari viðvíkjandi jarðfrøði og vórðu báðar mettar at vera nýtiligar tí víðvíkjandi.

Niðurstøðan gjørdist, at sunnara linjan hevði betru linjuføringina og loysti eisini trupulleikan viðvíkjandi vegnum á Stykkinum. Síðani vóru neyvari jarðfrøðisligar kanningar gjørdar á strekkinum og linjan justerað nakað.

Farið var at rigga til fyri hesi linjuni veturin 1988/89 og klárt var at seta á sjálva tunnilsgerðina apríl 1989, men av torføru fíggjarligu støðuni, sum tók seg upp í landinum, kom steðgur í.

**- Viðmerkingar**
Eitt reint handilsligt sjónarmið kundi talað fyri at framt norðaru linjuna (alt II), hendan er styttri og hevur har við lægri kostnað. Tó verður raksturin av atkomuvegnum Streymoyarmegin truplari enn fyri syðru linjuna (alt III).

Tað reint handilsliga sjónarmiðið má vigast upp í móti einum breiðari samfelagsligum sjónarmiði. Vanligt er at reint handilsligar ætlanir verða tálmaðar av ásetingum frá myndugleikum í líki av lógum, reglum ella loyvisviðgerð. Við atliti til vega- og tunnilsgerð eru ongar ávísar lógir ella reglur, ið regulera støði og skap. Vanligt hevur verið at nýta norskar veganormalar, tó við teimum tillagingum, sum hildið hevur verið at tørvur var á, í einstaka førinum.

Syðra linjan verður mjúkari og slættari enn norðara linjan og kemur ferðslan at ganga betri eftir hesari. Ferðslan frá tunnlinum fer ikki eftir vegnum við Leynar og Stykkið. Tað slepst undan at leggja atkomuvegin gjøgnum síðubratta lendi norðan fyri Kvívík, har nógvur kavi legst. Hesi viðurskifti hava ligið til grund fyri at tað í 1987 varð mælt til at byggja tunnilin eftir sunnaru linjuni (alt III).

Eitt ávíst virði er lagt í at fyrireika byggiplássið við Leynar og í at gera forkanningar og projekt fyri sunnaru linjuna, hetta fer fyri skeytið um norðara linjan verður vald. Eisini vil tað gerast neyðugt at fremja meira umfatandi jarðfrøðisligar kanningar og projektering fyri at fáa projektið fyri norðara tunnilin upp til sama støði, sum tilfarið, ið er tøkt fyri sunnara tunnilin. Hetta fer at krevja bæði pengar og tíð og vil harvið seinka ætlanina.

**- Niðurstøða viðvíkjandi val av linju**
Samanumtikið verður mett, at frægast er at fara undir at gera undirsjóvartunnilin millum Streymoynna og Vágoynna eftir sunnaru linjuføringini. Hendan linjan er væl kannað undan 1989; við endurskoðan í 1998/99 verður hon mett at vera væl egnað út frá jarðfrøðisligum sjónarmiði; og við dagføring er projekt tøkt fyri tekniskar installatiónir o.t.

## 2. Projektdagføring

### 2.1 Endurskoðan av jarðfrøðisliga grundarlagnum
November 1999 til januar 1999 hevur O.T. Blindheim ráðgevandi verkfrøðingafelag endurskoðað jarðfrøðisliga grundarlagið, sum fingið var til vega fram til 1989. Niðurstøða teirra er í stuttum, at grundarlagið sum heild er rættuliga væl nøktandi, men at tilfarið hevði gjørst betur við nakað av ískoytis kanningum. Eisini gera teir ta niðurstøðu, at tað er væl møguligt at gera undirsjóvartunnilin eftir sunnaru linjuføringini.

Endurskoðingin av jarðfrøðisliga grundarlagnum vísti á, at tað er ein fyrimunur at gera enn eina kjarnuboring 400m langa niðurímóti og framvið tunnlinum, og somuleiðis at gera nakað meira av seismiskum kanningum á einum strekki uml. 400m miðskeiðis í sundinum. Hesar báðar forkanningar koma at minka um óvissuna viðvíkjandi jarðfrøðisligu viðurskiftunum við tað, at seismikkur tá er tætt fram við allari tunnilslinjuni, og at kjarnuboringin vísur hvussu tilfarið undir botninum er og hvat seismisku virðini svara til í sjálvari hellini dygst við tunnilin.

Teir meta at hesar kanningar eiga at verða framdar áðrenn farið verður undir sjálvt arbeiðið at gera tunnilin, fyri at geva teimum, sum bjóða skulu, so fullfíggjað tilfar, sum gjørligt og harvið minka um óvissuna í tilboðum teirra.

Til tess at minka um tað, sum arbeiðstakarin má leggja út fyri til óvissu, er tað av stórum týdningi at grundarlagið fyri tunnilsgerðini er so neyvt sum gjørligt áðrenn boðið verður út, og omanfyri nevndu forkanningar eru tískil settar í verk.

### 2.2 Endurskoðan av tekniska projektinum
Avtala er gjørd við ráðgevandi felag um endurskoðan av tekniska partinum av projektinum, til tess at tryggja at royndirnar hesi 10 árini síðani upprunaliga projektið varð gjørt, verða tiknar við. Eftir endurskoðanina verður útbjóðingartilfar gjørt. Eisini verður kannað hvussu arbeiðið best kann tillagast til umhvørvið.

## 3. Útbjóðing
Tunnilin verður boðin út í innbodnari licitatión millum norðurlendskar arbeiðstakarar, sum hava førleika til at átaka sær slíkt arbeiði, við teirri treyt, at teir skulu gera arbeiðið í samstarvi við føroyskar arbeiðstakarar og við føroyskari

arbeiðsmegi um hon er tøk. Vegirnir verða bodnir út í innbodnari licitatión millum føroyskar arbeiðstakarar eins og onnur smærri sjálvstøðug arbeiði. Arbeiði, sum krevja serstakan kunnleika, verða boðin út har førleiki finst.

## 4. Fremjing av arbeiðinum

### 4.1 Trygd undir arbeiðinum

Forkanningarnar og tann vitan um hellina, sum fæst við at hyggja at helluni í sjálvum tunnlinum, verður grundarlag undir tilrættislegging av arbeiðinum at gera tunnilin. Arbeiðið verður lagt tilrættis so at vissa altíð er fyri hvussu tilfarið er, sum arbeiðast skal tvørtur í gjøgnum. Gjørdar verða sondér-boringar fram um tað staðið har komið er til við arbeiðinum, so at kunnleiki fæst til tilfarið, og vatnlekin úr sondér-holinum verður mátaður. Út frá hesum verður støða tikin til tetting og møguliga stabilisering av næsta strekki, sum arbeiðast skal ígjøgnum. Vísur tað seg at tilfarið er av einum slíkum slag, at tað kann elva til trupulleikar ella at vatnlekin er omanfyri ávís mørk, verða frammanundan ásettar mannagongdir viðvíkjandi trygging, eyka tetting v.m. at fylgja.

### 4.2 Tíðarætlan

Arbeiðið er ætlað at verða framt eftir 3-4 árum, sum tað kann loysa seg best, tá ið mett verður um entrepenørkostnað í mun til fyrimunin av at tunnilin kann verða tikin í nýtslu fyrr.

Á myndini niðanfyri er víst ein tíðarætlan, svarandi til at arbeiðið verður framt innan fyri 3 ár frá arbeiðsbyrjan. Roknað er við at byrja við tunnilsgerð Streymoyarmegin so skjótt, sum sáttmáli er gjørdur. Samstundis verður farið undir at gera atkomuveg Vágamegin og síðani verður riggað til, so farast kann undir tunnilsgerð Vágamegin frá eisini. Tá ið tunnilin er gjøgnumsprongdur verður farið undir liðugtgerð. Farið verður undir vegagerð Streymoyarmegin, tá ið tunnilsarbeiðið er komið væl og virðiliga í gongd. Tá ið vegagerðin Streymoyarmegin er liðug, verður farið undir vegagerð Vágamegin, tá verður eisini tilfar tøkt frá tunnlinum, sum kann nýtast til uppbygging av vegkassanum.

| | 1999 | | 2000 | | | | 2001 | | | | 2002 | | | | 2003 | mió |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | kv3 | kv4 | kv1 | kv2 | kv3 | kv4 | kv1 | kv2 | kv3 | kv4 | kv1 | kv2 | kv3 | kv4 | kv1 | kr |
| **Fyrireiking** | | | | | | | | | | | | | | | | 9 |
| **Streymoy** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **- tilrigging** | | | | | | | | | | | | | | | | 3 |
| **- tunnilsgerð** | | | | | | | | | | | | | | | | 51,3 |
| **- liðugtgerð** | | | | | | | | | | | | | | | | 53,7 |
| **- vegagerð** | | | | | | | | | | | | | | | | 3 |
| **Vágoy** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **- atkomuvegur** | | | | | | | | | | | | | | | | 5 |
| **- tilrigging** | | | | | | | | | | | | | | | | 5 |
| **- tunnilsgerð** | | | | | | | | | | | | | | | | 42,7 |
| **- liðugtgerð** | | | | | | | | | | | | | | | | 40,3 |
| **- vegagerð** | | | | | | | | | | | | | | | | 18 |
| **Avrigging** | | | | | | | | | | | | | | | | 9 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 240 |
| **Kostnaður** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **- Fyrireiking** | 3 | 3 | 3 | | | | | | | | | | | | | 9 |
| **- Tilrigging** | | | | 3 | | 5 | | | | | | | | | | 8 |
| **- Atkomuvegur** | | | | | 5 | | | | | | | | | | | 5 |
| **- Tunnilsgerð** | | | | | 8 | 8 | 16 | 17 | 18 | 18 | 9 | | | | | 94 |
| **- Liðugtgerð** | | | | | | | | | | | 13 | 27 | 27 | 27 | | 94 |
| **- Vegagerð** | | | | | | | | 1 | 2 | 6 | 6 | 6 | | | | 21 |
| **- Avrigging** | | | | | | | | | | | | | | 4 | 5 | 9 |
| **Tils pr kvartal** | 3 | 3 | 3 | 3 | 13 | 13 | 16 | 18 | 20 | 24 | 28 | 33 | 27 | 31 | 5 | 240 |
| **Akk. kostnaður** | 3 | 6 | 9 | 12 | 25 | 38 | 54 | 72 | 92 | 116 | 144 | 177 | 204 | 235 | 240 | 240 |

Fram í móti at tunnilin er liðugtgjørdur verður farið undir avrigging av arbeiðsøkjum eins og snøklar o.a. verður gjørt.

Á myndini omanfyri sæst eisini hvussu kostnaðurin verður mettur at býta seg millum einstøku partarnar av arbeiðinum, eins og hvussu býtið verður yvir byggitíðina. Við støði í fyrireikandi arbeiðinum hjá Landsverkfrøðinginum er kostnaðurin av projektinum mettur at vera 240 mió kr.

**5. Rakstur av tunnlinum**

Í yvirlitinum niðanfyri er víst hvussu inntøkurnar og rakstrarútreiðslurnar kunnu vera. Inntøkurnar av ferjusambandinum er í løtuni uml. 14 mió kr um árið. Inntøkurnar hjá tunnlinum kunnu vera nakað hægri, við tað at eitt ávíst ferðslulop verður tá ið tunnilin letur upp, og við tað at ferðafólkið hevur ein øktan gjaldsvilja, svarandi til virðið av bíðitíð og ampum tey sleppa undan. Roknast kann við at tunnilin fær 15-30% hægri inntøku svarandi til 16-18 mió kr um árið, roknað verður fyri fyrst við 17 mió kr um árið í inntøku.

| | | |
|---|---|---|
| **Inntøkur frá bummpeningaskipani:** | | 17.000.000 |
| | | |
| **Rakstur** | | |
| Lønir ot. | 2.000.000 | |
| Skrivstovutænastur v.m. | 700.000 | |
| Viðlíkahald | 1.500.000 | |
| El | 1.550.000 | |
| Trygging | 1.000.000 | |
| Óvæntaðar útreiðslur | 250.000 | |
| **Rakstur tilsamans** | | 7.000.000 |
| **Eftir til rentur og avskrivingar** | | 10.000.000 |

Ferðafólkatal og nýtslugjald eru grundleggjandi fortreytir fyri inntøkugrundarlagnum hjá felagnum. Tí er felagið saman við Vinnumálastýrinum og Strandferðsluni í løtuni í holt við at gera eina kanning av ferðslumynstri og gjaldsvilja hjá ferðafólki um Vestmannasund.

**5.1 Nýtslugjøld**

Nýtslugjøldini mugu ásetast, so tey tryggja felagnum ta inntøku, sum neyðug er til forsvarligan rakstur av felagnum. Inntøkan hjá felagnum kemur at vera tengd at ferðafólkatali og støddini á nýtslugjaldinum, ið eisini ávirka hvørt annað sínámillum so, at eitt ov høgt gjald vil styggja ferðandi burtur, meðan eitt lægri gjald vil draga ferðandi til. Er gjaldið ov lágt, kemur samlaða inntøkan at verða ov lítil. Kanningar av gjaldsviljanum hjá ferðafólki, benda á, at tey eru sinnað at lata eitt nakað hægri gjald, um tey sleppa undan bíðitíð og teimum ampum annars, ið standast av einum ferjusambandi. Neyðuga inntøkan velst um beinleiðis kostnaðin av tunnlinum, fíggjarkostnaðin og kostnaðin av at reka tunnilin.

Við so mongum ymiskum viðurskiftum, sum ávirka hvørt annað sínámillum, er greitt, at støddin á nýtslugjaldinum er altavgerandi fyri, um felagið verður ført fyri at røkja skyldur sínar, og at gjaldið sjálvt, í fyrsta lagi má ásetast tá ið tunnilin er bygdur og klárur at taka í nýtslu, og í øðrum lagi má tillagast til tørvin hjá felagnum so hvørt, sum ferðslumynstrið verður betur kent.

**5.2 Rakstrarútreiðslur**

Rakstrarútreiðslurnar eru mettar út frá royndunum frá rakstrinum av Hvalfjørðurtunnlinum, við nakað av tillaging til føroysk viðurskifti.

Sum tað sæst omanfyri, verður úrslitið av rakstrinum uml. 10 mió kr um árið og kann hesin peningur nýtast til gjalding av rentu og niðurgjalding av láni.

**6. Fíggjarligt**
Nevndin setti sær fyri at troyta fíggingarmøguleikarnar í Føroyum fyrst. Natúrligt var tí at seta seg í samband við Íleggingargrunnin fyri Føroyar, sum hevur til endamál m.a. at fíggja tílíkar samferðsluverkætlanir. Á fundi við grunnin hevur felagið greitt frá verkætlanini og tí fíggjarliga tørvinum og søkt um fígging frá grunninum.

Íleggingargrunnurin hevur játtað at veita byggifígging og langtíðarfígging og er hendan játtan treytað av eini anleggslóg.

Mett verður, at neyðugu lánini kunnu verða afturgoldin eftir uml. 15 árum frá tí at tunnilin er tikin í nýtslu.

Verkætlanin verður fíggjað partvís við játtan á fíggjarlógini yvir 8 ár. Restfíggingin er fingin til vega. Í hesum sambandi eigur at vera nevnt, at tørvurin á restfígging vildi verið uml 10 mió kr minni, um játtaði peningurin á fíggjarlógini varð útgoldin í einum.

**7. Anleggslóg**
Til tess at staðfesta heimildina hjá felagnum at krevja inn og áseta bummpengar, til tess at staðfesta játtanina av komandi partapeninginum, og til tess at fáa aðrar heilmildir til vega m.a. ognartøkuheimild, fer nevndin at mæla til at gjørd verður ein anleggslóg fyri Vágatunnilin. Í sambandi við fyrireiking av lógaruppskotinum, verður kannað hvussu veðseting av ognum felagsins kann fara fram.

Tilsøgnin um fígging av tunnlinum, sum er fingin, er treytað av at innihaldið í anleggslógini er nøktandi viðvíkjandi møguleikum fyri trygd v.m.

Uppskot til lóg (hjálagt) er evnað til við 10 greinum. Greinarnar 1 og 2 staðfesta endamálið við lógini, rættin til at gera tunnilin og hvussu tunnilin skal góðkennast og hvussu hann skal avhendast til landið, tá ið hann er goldin.

Greinarnar 3 og 4 staðfesta peningajáttan til felagið og játtan av at felagið kann taka yvir áður gjørda arbeiðið. Av hesum báðum er grein 3 grundleggjandi í sambandi við at veita trygd fyri játtaða láninum og er innihaldið í henni principielt góðtikið av lánveitaranum.

Grein 5 ásetur krøv til felagið og at landið einsamalt eigur felagið.

Grein 6 staðfestir rættin hjá eigaranum av tunnlinum at áseta og krevja inn nýtslugjald eins og avmarkað verður í mun til landsvegin og ábyrgdin fyri at tryggja vegunum neyðuga vakstrarrúmið verður løgd til landsstýrismannin. Staðfestingin av rættinum hjá eigaranum at áseta og krevja inn nýtslugjald er grundleggjandi í sambandi við at veita trygd fyri játtaða láninum. Greinin er principielt góðtikin av lánveitaranum.

Grein 7 ásetur hvussu ognartøka av lendi v.m. til fast samband um Vestmannasund kann fara fram.

Grein 8 ásetur skattlig viðurskifti fyri felagið og gevur møguleika fyri avskriving yvir 30 ár av samlaðu byggiútreiðslunum.

Grein 9 gevur møguleika fyri sjónvarpseftiransing av gjaldsstøðum og er neyðug fyri at kunna skipa eina sjálvvirkandi innkrevjing við tilhoyrandi skráseting av teimum, sum misnýta skipanina.

Grein 10 í lógini sigur nær hon kemur í gildi.

Tórshavn, tann 17. juni 1999

Klæmint Weihe — Jens Kári Vilhelm

Dávid Reinert Hansen — Bergur í Garði

Heri M. Hammer